# Atli lagt frá sær

**Eftir at hava verið við í nevndini í 12 ár, og eftir at hava verið formaður tey síðstu 7, hevur Atli Hansen nú lagt frá sær sum formaður hjá Felagnum Nótaskip**

NÓTASKIP
*Heini S. Kristiansen*
*Heinik@sosialurin.fo*

Atli Hansen í Gøtu hevur lagt frá sær sum formaður í Felagnum Nótaskip. Varaformaðurin Kristian Martin Rasmussen er virkandi formaður, inntil nýggjur formaður er valdur. – Hetta er ein natúrlig gongd at trappa niður, nú eg eri komin eitt sindur upp í árini. 12 ár eru nóg leingi og nú skal onkur annar sleppa framat, heldur Atli Hansen. Hann verður 65 ár í summar, so nú vil hann



*12 ár er long tíð í slíkum nevndararbeiði, heldur Atli Hansen, sum nú hevur lagt frá sær sum formaður í felagnum Nótaskip*

fegin so smátt sleppa at njóta sína pensjón. Eg havi fegin vilja sloppið burturúr í eina tíð nú, men tað hevur ikki ordiliga borið til, men nú er tíðin búgvin til at eg leggi frá mær, sigur hann.

Tað hava verið nøkur hendingarrík ár, meðan Atli hevur verið við í Felagnum Nótaskip. Tá ið hann kom uppí fyri 12 árum síðani, var nótaflotin í kreppu. Atli sigur seg minnast, at nógvir ungir menn settu allar sínar pengar í, fyri at fáa Trónd í Gøtu og Finn Fríða til Gøtu. Hendan íløgan ber nú frukt, tí nú gongur sera væl hjá uppisjóvarskipunum.

– Okkara floti hevur endurnýggjað seg og er í dag ein tann mest framkomni í heiminum. Norðhavssildin vitjar í summarhálvuni, og svartkjaftastovnurin er væl fyri. Makrelurin er eisini nógv betri fyri nú, enn hann hevur verið, sigur Atli Hansen.

Hóast tað hava verið nøkur góð ár, meðan Atli hevur verið formaður, so leggur hann dent á, at framgongdin er ikki honum at takka. Men tað er einki at taka seg aftur í, at hann hevur tikið eitt stórt tak, og hann hevur verið ímyndin av Felagnum Nótaskip.

– Onkuntíð eru stovnarnir væl fyri og onkuntíð minni væl. Tað er ikki í okkara hondum, sigur hann.

Nú Atli hevur lagt frá sær, hevur hann møguleika at raðfesta sína tíð øðrvísi.

– Tú fært einki gjørt við, at tú eldist, so hóast tað er við sorgblídni, at eg leggi frá mær, so er tað góða í tí, at eg fái betri tíð til frítíðarítrivið. Mær dámar sera væl at putlast í bátinum, og eg fái betri tíð at fara á flot nakrar dagar, sigur Atli Hansen.

Harvið sleppur fyrrverandi sjómaðurin og formaðurin í Felagnum Nótaskip ikki havinum og fiskiskapinum heilt.

# Bókmentavirðisløn Astrid Lindgrens latin Katherine Paterson

**Heimsins størsta bókmentavirðisløn fyri barna- og ungdómsbøkur varð í ár latin amerikanska høvundanum Katherine Paterson, sum eisini er kend um okkara leiðir**

VIRÐISLØN

Stóra bókmentavirðislønin, ið verður latin til minnis um Astrid Lindgren, er fimm milliónir svenskar krónur, og er hon tann størsta, sum givin verður barna- og ungdómshøvundum og myndprýðarum.

Í grundgevingini fyri at lata Katherine Paterson virðislønina varð millum annað sagt:

"Katherine Paterson fer inn undir húðina á teimum ungu, viðkvæmu menniskjum, hon skapar, hvørt hendingarnar fara fram í søguligum og fremmandum umhvørvi ella í einum hørðum amerikanskum gerandisdegi. Við eini serstakari estetiskari kenslu sleppir hon sær undan einføldum loysnum og mennir í staðin íbornu styrkina og lívshugin í høvuðspersónunum"

### Týdd til føroyskt

Katherine Patherson er ikki heilt ókend um okkara



*Kenslan av at vera øðrvísi gongur sum ein reyður tráður gjøgnum nógvar av bókunum hjá Katherine Paterson*

leiðir. Bókadeild Føroya Lærarafelags gav í 1989 út bókina Brúgvin, sum er um 10 ára gamla drongin Jess. Hann eigur 4 systrar, men trívist illa saman við teimum, tí tær eru so fjákutar. Men so flytir Leslie inn í grannahúsini, og hon er heilt øðrvísi enn aðrar gentur. Leslie fer við Jess inn í loyniliga heimin Terabithia, ein heimum á tremur við hugflog og vitan, og har mennist vinalag teirra. Jess broytist og fær dirvi at taka støðu sjálvur. Men tá verður Leslie brádliga tikin frá honum…

Bergljót Joensen (av Skarði) týddi bókina til føroyskt, sum kom út í Barnabókaklubbanum í oktober 1989.

### At kenna seg uttanfyri

Katherine Paterson heldur sjálv, at tað er eitt undur, at hennara søgur onkursvegna røkka yvir um høv, mál, aldur, tjóðskap, ættfólk og allar tær forðingar, vit menniskju seta.

Hetta, at flestu høvuðspersónar hennara eru burturkveistraðir og við skerdan lut, men samstundis ikki lata seg kúga, heldur hon kemst av, at tá ið familja hennara kom úr Kina til USA, kendi hon seg fremmanda, sum kom hon frá eini aðrari gongustjørnu. Einastu vinir hennara vóru bøkurnar. Hetta hevði við sær, at Katherine Paterson longu sum barn fekk eina greiða fatan av, hvat tað vil siga at kenna seg uttan fyri tað viðurkenda samfelagið.

Katherine Paterson hevur skrivað 14 bøkur og hevur fingið eitt ótal av virðislønum. Brúgvin var fyrsta bók hennara, og fyri hana hevur hon fingið átta virðislønir úr fleiri ymiskum londum. At serliga Brúgvin hevur havt nógv at týða fyri hana sæst av, at heimasíðan hjá Katherine Paterson eitur www.terabithia.com

**ave**



*Í vikuskiftinum bjóðar Leikalund fólki høvi at fáa lisið sínar hendur av roynda hondlesaranum Maritu*

# Hondlesing í Leikalund

**Føroya einasti hondlesari, Marita, ber orð fyri at vera óvanliga beinrakin í sínum útsøgum. Um vikuskifti verður høvi at hitta hana í Leikalund í Klaksvík**

HONDLESING

Í samband við at Norðoyatunnulin verður tikin í nýtslu, skipar Leikalund fyri einum heldur øðrvísi tiltaki um vikuskiftið. Leygardagin og sunnudagin verður høvi hjá fólki at uppliva hondlesaran Maritu í handlinum.

### Sera beinrakin

Marita hevur virkað sum hondlesari í Danmark í nógv ár, men hevur hesi seinnu árini eisini vitjað í Føroyum. Her hevur hon givið fólki møguleikan at fáa innlit í henda aldargamla vísdóm við at lesa hendur teirra.

Í Føroyum er Marita millum annað kend frá sjónvarpssendingini Cassiopeia. Fólk, sum hava verið hjá henni, siga, at hon er ómetaliga beinrakin í sínum útsøgnum. Marita fortelur fólki nógv um teirra fortíð og nútíð, og samstundis veitir hon eisini stuðul og vegleiðing í spurningum, sum hava við framtíðina at gera.

Marita er at hitta í Leikalund leygarmorgunin frá klokkan 10.00 og sunnudagin frá klokkan 14.00. Til ber at tryggja sær pláss hjá Føroya einasta hondlesara við at bíleggja tíð í Leikalund longu nú.

Hvør lesing varðar á leið 12 minnutir, og gera tey frá Leikalund vart við, at hondlesingin er at meta sum ein smakkroynd av hesum aldargamla kynstri.

# Nýggjar, ungar yrkingar

**Ungi yrkjarin Christian Andreasen úr Leirvík gav herfyri út sítt fyrsta yrkingasavn. Savnið hevur heitið "Heart Broke Believe", og bera yrkingarnar dám av ungdómsins tankum um lívsins stóru spurningar**

NÝTT YRKINGASAVN

Drívmegin í savninum er leitanin eftir kærleika, Gudi og eins leikluti í lívinum.

Í flestu av yrkingunum hómast ein ivasom sál, sum sera erliga og húðleyst setir orð á sínar innastu kenslur um stórar spurningar so sum kærleika, svik, trúgv ella ynski um at trúgva. Aðrar bera meir dám av gerandistonkum um at drekka seg fullan, hyggja eftir konufólki ella standa á flakavirki og droyma um at gerast stjørna.

"Heart Broke Believe" er skipað í tríggjar partar. Yrkingarnar í fyrsta parti eru á føroyskum, meðan tær í øðrum og triðja parti eru á enskum.

Í alt 43 longri og styttri yrkingar eru í savninum, sum er givið út á egnum forlagi.

**ave**




*Ungdómsins kenslur seta dám á fyrsta yrkingasavnið hjá Christian Andreasen "Heart Broke Believe", sum kom út beint fyri páskir*